# ítróttur

Nr. 147 • fríggjadagur • 8. august 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo



# Todi tvey mál í leikandi løttum sigri



*Todi skeyt tvey av málunum hjá FCK í stórsigrinum á maltesisku meistarunum*

**Ítróttarstjórin í FCK heldur, at felagið hjá honum ikki fær betri møguleika at sleppa upp í part í bólka-spælinum, enn teir hava, nú teir skulu spæla ímóti Glasgow Rangers**

EUROPA CUP
*Jóannes Hansen*

Tað var eingin ivi. Við tennisúrslitinum 6–0 staðfesti FCK mikukvøldið í 30 hitastigum á Ta'Qali tjóðarvøllinum á Malta, at teir skuldu eiga rættin til í triðja og avgerandi innleiðandi umfarinum at spæla ímóti Glasgow Rangers um eitt pláss í bólkaumfarinum, har tær nógvu milliónirnar eru at vinna.

– Eg havi fyri stuttum sæð Gasgow Rangers spæla ímóti Arsenal. London felagið vann 3–0, og teir spældu Glasgow Rangers sundur og saman, sigur Niels–Christian Holmstrøm, ítróttarstjóri í FCK, sum avgjørt ikki heldur, at skotska meistaraliðið tóktist sum stór hóttan.

Danskir fjølmiðlar vísa á, at í royndini at styrja seg undan avgerandi innleiðandi umfarinum hevur Rangers eitt nú keypt norska Henning Berg. Áður hevur hann verið so mikið stinnur miðverji, at hann hevur spælt eitt nú í Manchester United, men tað eru nøkur ár síðani, og nú er Henning Berg væl og virðiliga farin um bestu fótbóltsárini. Donsku miðlarnir halda, at tað verður guff hjá eitt nú Zuma at hava Henning Berg sum mótstøðumann.

Fyrri dysturin millum Glasgow Rangers og FCK verður á Hampden Park í Glasgow komandi mikukvøld. FCK skipar fyri flogferð í sambandi við dystin. Seinna uppgerðin verður í Parkini mikukvøldið 27. august.

Eftir ferðina suður á Malta eru tveir FCK spælarar eitt sindur smáskaddir. Talan er um Zuma og Erik Mykland. Hans Backe, FCK venjarin, segði á heimferðini, at tað ikki er óhugsandi, at teir báðir fara at sita uttanfyri, tá ið FCK leygardagin fer at spæla í Esbjerg.

– Vit hava breiðan hóp, og næstu vikurnar fara vit at fáa brúk fyri øllum spælarunum, staðfesti FCK venjarin, sum ikki roknar við, at nýggi brasilski álopsmaðurin verður við í útidystinum.

Mikukvøldið avloysti Jörgen Pettersson síðsta hálva tíman Zuma. Aftaná varð sagt, at Pettersson ikki er komin seg heilt eftir vøddaskaðan, og tað kann væl hugsast, at hann verður ikki við leygardagin.

Peter Møller fekk møguleikan alt seinna umfarið. Hann loysti Toda Jónsson av, men hann spældi ikki væl. Temjingarnar vóru ikki góðar, og hann tóktist alt í alt ikki serliga væl fyri. Nú FCK hevur keypt dýran brasilskan álopsspælara verður í donskum miðlum gitt, at FCK fer at selja Peter Møller. Um so verður so verður tað heilt skjótt.

### Todi tvær ferðir

Todi Jónsson átti sín stóra lut í størsta útisigrinum, sum FCK nakrantíð hevur vunnið í Europa Cup. Hóast hann bara var á vøllinum fyrru trý korterini, so skoraði hann tvey mál. Hitt fyrra fekk hann, tá ið seytjan minuttir vóru farnir. Eftir verjumistak sneiddi hann seg leysan og setti framvið málverjanum. Tá fór luftin fullkomuliga úr heimaliðnum, sum frá fyrsta bríksli hevði tríggjar spælarar í álopinum og tóktist ætla sær at vinna 4–1 tapið í Parkini aftur.

Hjalte Bo Nørregård økti til 2–0 við rimmar langskoti úr 25 metrum. Bólturin brast í nettakið dygst undir samankomingini. Fýra minuttir undan steðginum økti Todi Jónsson til 3–0, og harvið skoraði hann sjeynda Europa Cup málið fyri FCK. Zuma og Todi gjørdust einsamallir á mótstøðuhálvuni, tá ið rangstøðufellan kiksaði. Todi hevði bóltin, og í staðin fyri at leggja fyri føturnar á Zuma – vandi var fyri, at hann skuldi verða rangstaddur – valdi Todi at sneiða fram við málverjanum. Á málstrikuni steðgaði hann á, áðrenn hann flutti bóltin inn um strikuna, tók hann út aftur og vendi so aftur og sendi bóltin í netið.

Tá ið Todi ikki kom á vøllin eftir steðgin, vildi frásøgumaðurin vera við, at talan kanska var um sekt, tí hann hevði verið hástórur, tá ið hann skoraði seinna málið. Hetta varð í gjár endurtikið onkrastaðni í donsku miðlunum, men FCK venjarin hevur einki sagt um hetta.

Í 2. hálvleiki legði Sliema Wanderers fyri við at gera sjálvmál. So skoraði Zuma, og Thomas Røll setti punktum við flottum máli, eftir at hann í vinstru hevði sneitt seg leysan.

# Svøríki var størsta vónbrotið

**Umframt FCK er norska Rosenborg einasta norðurlendska felagið, sum skal royna seg í triðja innleiðandi umfarinum**

EUROPA CUP
*Jóannes Hansen*

Rosenborg úr Tróndheimi megnaði mikukvøldið tað, sum teir plaga at gera. Eftir at teir á útivølli høvdu vunnið 1–0 var eingin ivi, tá ið norska stórfelagið mikukvøldið hevði vitjan av Bohernians, ið varð sent til hús við 4–0 tapi.

Rosenborg plagar at standa seg væl, og teir hava øgiliga gátt, sum teir skulu upp um, áðrenn teir kunnu sleppa upp í part í bólkaspælinum. Næst á skránni er spanska stórfelagið Deportivo La Coruna.

Finska HJK Helsinki hevði í útidystinum ímóti MTK Budapest tapt 3–1. Útivallarmálið var týdningarmikið, og tað varð mett ikki at vera heilt ómøguligt at vinna samantalt hjá finska liðnum. HJK vann á heimavølli, men teir vunnu bara 1–0.

Størsta norðurlendska vónbrotið var tað, at svenska meistaraliðið Djurgården úr Stokhólmi ikki megnaði at spæla seg í triðja innleiðandi umfarið. Tað sá annars rættuliga ljóst út eftir fyrra dystin. Í Beograd hevði Djurgården ímóti Partizan megnað 1–1. Á heimavølli komu teir framum 1–0, men eftir lítlari løtu stutt fyri steðgin skoraðu gestirnir tvey mál. Djurgården megnaði at javna til 2–2, men tað var ikki nóg mikið. Partizan var omaná, tí teir høvdu skorað fleiri mál á útivølli.

FBK Kaunas sendi uttan nakað himpr HB úr kappingini. Tá ið teir í Kaunas mikukvøldið fóru á vøllin í Glasgow, var tað longu greitt, at Celtic hevði vunnið. Skotska stórfelagið vann 4–0 á úti vølli, og mikukvøldið løgdu teir ikki so nógv fyri. Kaunas gjørdi sjálvmál í 21. minutti, og tað var einasta málið hesa ferð. Í triðja og avgerandi innleiðandi umfarinum skal Celtic spæla ímóti MTK úr Budapest.

Belgiska Anderlecht vísti mikukvøldið, at tað ber til at koma afturíaftur, hóast tað sær rættuliga svart út. Ímóti Rapid Bukarest á útivølli høvdu teir megnað málleysan javnleik. Men á heimavølli fingu teir heilt skjótt tvey mál ímóti sær, og so tóktist eingin vón at vera. Men Anderlecht megnaði at svara aftur og at skora tey trý málini, sum skuldu til, fyri at teir skuldu sleppa í triðja innleiðandi umfarið.


**HAVNAR BIO**
Tlf. 31 19 56
www.bio.fo
Listastevnan



Fríggjadagin 08.08. kl. 16[30]


DANSURIN
Fríggjadagin 08.08. kl. 17[00]



Leygardagin 09.08. kl. 15[00]
Sunnudagin 10.08. kl. 15[00]
Leygardagin 16.08. kl. 15[00]
Sunnudagin 17.08. kl. 15[00]



Leygardagin 09.08. kl. 17[00]
Sunnudagin 10.08. kl. 17[00]
Mánadagin 11.08. kl. 16[30]
Týsdagin 12.08. kl. 16[30]
Mikudagin 13.08. kl. 16[30]



Leygardagin 09.08. kl. 16[30]
Sunnudagin 10.08. kl. 16[30]
Mánadagin 11.08. kl. 17[00]
Týsdagin 12.08. kl. 17[00]



Mikudagin 13.08. kl. 17[00]
Hósdagin 14.08. kl. 17[00]
Fríggjadagin 15.08. kl. 17[00]
Leygardagin 16.08. kl. 17[00]
Sunnudagin 17.08. kl. 17[00]



Hósdagin 14.08. kl. 16[30]
Fríggjadagin 15.08. kl. 16[30]
Leygardagin 16.08. kl. 16[30]
Sunnudagin 17.08. kl. 16[30]



WWW.SOSIALURIN.FO

WWW.SOSIALURIN.FO



## Tórshavnar Ítróttarráð

**Úrslit av drátti 4. august 2003**

Hesir seðlar hava vunnið:

| | |
|---|---|
| Vinningur nr. 1: | 16963 |
| Vinningur nr. 2: | 1261 |
| Vinningur nr. 3: | 9499 |
| Vinningur nr. 4: | 18365 |
| Vinningur nr. 5: | 1384 |
| Vinningur nr. 6: | 6736 |
| Vinningur nr. 7: | 2661 |
| Vinningur nr. 8: | 9451 |
| Vinningur nr. 9: | 5405 |

**Vinnarnir vera bidnir um at seta seg í samband við Kristionnu á tlf.: 312380 - 319017 - 227717**





**Skjóttgangandi bátur av slagnum TG 6400**

- 22' fót glasfiber við rúmligari cabinu og hevur dekk aftan og framman
- 105 hk volvo penta turbo diesel
- topfartur er 32 míl
- er útstýrdur við Ekkolodd, Radara, GPS pláttara & VHF
- í fínasta standið

**TIL SØLU við vogni**
Ring tlf. 212789



Sosialurin 341800



## Ovastevnan 2003

**SKRÁ:**

**Fríggjadagin 8. august**
kl. 18.00 Kabarettin "Cabaleum" verður sýnd fyri børnum í Royndarhúsinum
kl. 18.00 - 22.00 Tombola og skjótibani á Nýggjaveg
kl. 19.30 - 22.30 Hoppiborg, skreiðiborg og miniásni í skúlagarðinum
kl. 19.30 - 01.30 Mekaniski tarvurin í skúlagarðinum
kl. 19.00 - 22.00 Stevnukioskin opin
kl. 20.00 Kabarettin "Cabaleum" verður frumsýnd í Royndarhúsinum
kl. 20.00 - 22.30 Barnadansur í teltinum
kl. 23.00 Dansur í teltinum, nólsoyingar spæla við gestaupptraðkan av Anfinn Nielsen (Anfinn & Co)

**Leygardagin 9. august**
kl. 14.00 Kaj Leo Johannesen, løgtingsmaður, setur stevnuna í Geilini. Nólsoyar sangkór luttekur.
kl. 14.30 - 24.00 Stevnukioskin opin
kl. 15.00 - 24.00 Tombola og skjótibani á Nýggjaveg
kl. 15.00 - 22.30 Hoppiborg, skreiðiborg og miniásni í skúlagarðinum
kl. 15.00 - 03.30 Mekaniski tarvurin í skúlagarðinum
kl. 15.00 - 17.00 Andlitsmálan av børnum í skúlanum
kl. 16.00 - 18.00 Bygdarsavnið opið
kl. 15.00 - 19.00 Loppumarknaður í skúlanum
kl. 15.00 - 19.00 21-spæl og fiskibrunnur í skúlanum
*uml.* kl. 15.30 Fyrstu svimjararnir koma á mál
kl. 17.30 Kabarettin "Cabaleum" í Royndarhúsinum
*uml.* kl. 17.00 Regattain kemur til Nólsoyar
kl. 19.30 Kabarettin "Cabaleum" í Royndarhúsinum
kl. 19.00 - 21.00 Andlitsmálan av børnum í skúlanum
kl. 20.00 - 22.30 Barnadansur í teltinum
kl. 22.00 Felagssangur undir Mikkjalsveggi
kl. 24.00 Dansur í teltinum, Showmen (Kim, James, Jóhannus og Jens Marni) spæla

**Sunnudagin 10. august**
kl. 12.00 Gudstænasta við Bjarna Bæk, presti
kl. 15.30 Sterkasti maður og fimasta kvinna í skúlagarðinum
kl. 17.00 - 19.00 Loppumarknaður í skúlanum
kl. 15.00 - 19.30 21-spæl og fiskibrunnur í skúlanum
kl. 15.00 - 19.30 Hoppiborg, skreiðiborg og miniásni í skúlagarðinum
kl. 15.00 - 19.30 Mekaniski tarvurin í skúlagarðinum
kl. 17.00 - 19.00 Andlitsmálan av børnum í Avhaldshúsinum
kl. 16.00 - 18.00 Bygdarsavnið opið
kl. 17.00 - 20.00 Tombola og skjótibani á Nýggjaveg
kl. 17.00 - 20.00 Stevnukioskin opin
kl. 18.00 Kabarettin "Cabaleum" í Royndarhúsinum

**Mánadagin 11. august**
kl. 20.00 Kabarettin "Cabaleum" í Royndarhúsinum

**Í sambandi við stevnuna siglir Ritan soleiðis um vikuskiftið:**

| Fríggjadag | Leygardag | Sunnudag |
|---|---|---|
| kl. 07.00 | kl. 08.00 | kl. 10.00 |
| kl. 09.30 | kl. 13.00 | kl. 15.00 |
| kl. 12.00 | kl. 15.00 | kl. 18.00 |
| kl. 16.20 | kl. 18.00 | kl. 19.30 |
| kl. 19.00 | kl. 21.00 | kl. 20.30 |
| kl. 20.00 | kl. 23.00 | |
| kl. 23.00 | kl. 03.00 | |

*Sigit verður av Bursatanga nevndu tíðir og úr Nólsoy 25 min. seinni.*
*Siglt verður, til øll eru komin aftur til Havnar.*

Sosialurin 341800



**Internet Sosialurin**
www.sosialurin.fo

**Sosialurin**
*Lesið Sosialin - tað loysir seg*